gult cyan magenta svart

VIÐMERKINGAR

Blaðmannafelagið og lygnin hjá Eidesgaard

Sjúrður Skaale



Blaomannafelagio ger ikki nógv seg. Sjálvt ikki tá blaomenn siga seg veroa sensureraoar og hóttar av javnaoarpolitikarum, letur tao vio seg koma. Men tá Eidesgaard fær serliga senditio í SvF, og nytir hana til at lúgva, fara Jústinus Eidesgaard & Co. til verka. Ikki fyri at lysa málio, men fyri at fáa tao burturtagt... Jústinus hevur tí skapt illgruna um, at felagio virkar politiskt. Hann má koma vio eini frágreioing

Tann 8. februar slapp Jóannes Eidesgaard, soleiois heilt ekstraordinert, fram at skíggjanum í Sjónvarpi Føroya.

Og tao vóru ikki smávegis ekstraordiner boo, Eidesgaard hevoi at bera Føroya fólki: Hergeir Nielsen hevoi fyrr um kvøldio logio um tao, sum var farid fram á einum fundi! segoi hann.

Hetta helt SvF vera so tydningarmikil tioindi, at tey, heilt ekstraordinert, máttu berast fólki - hóast dead-line langt sioani var farin.

Fleiri undrast á hesa mannagongd - m.a. Sámal Petur í Grund, Løgtingsmaour. Ráoharrin í mentamálum skal svara einum spurningi frá honum um, hvørt nakrar reglur eru fyri, nær ein politikari kann koma framat mikrofonini, og um allir politikarar eru javnsettir í SvF.

Men blaomannafelagio heldur lítio um, at Sámal Petur spyr. "Fyrispurningurin leggur seg út í redaktionella frælsio hjá fjølmiolunum at nyta tær keldur, redaktiónsleioslan sjálv heldur eru neyougar at lysa eitt mál til fulnar", sigur Jústinus Eidesgaard, formaour.

Og fyri at foroa fyri at hetta hendir, royndi Blaomannafelagio so í staoin leggja seg út í arbeioio hjá tinginum, og fáa tingmenn at atkvøoa ímóti, at spurningurin varo svaraour.

Eidesgaard lygur

Tao eydnaoist ikki blaomannafelagnum at steoga spurninginum. Men at felagio royndi vísir, at tao heldur talan vera um eitt stórmál. Og tao er sjálvsagt eisini fint, at felagio vil verja tao "redaktionella frælsio hjá fjølmiolunum".

Men reaktiónin tykist heldur enn ikki yvirdimensioneraо. Tí hvørn skaoa kann tao gera, at ein spurningur verour settur? At eitt mál verour umrøtt?

Limirnir í blaomannafelagnum liva av at spyrja fólk til tess at fáa viourskifti lyst. At hetta felag roynir at fáa eitt mál burturtagt og foroa fyri at spurt verour um tao, tykist ikki sørt løgio.

Og tao tykist enn løgnari eftir tao, sum sioani er komio fram:

Ein stórur meiriluti av teimum, sum vóru á tí umrødda fundinum, gevur neyniliga Hergeiri rætt og Jóannesi órætt. Tao sama ger løgmaour. Tao sama gera tvær skrivligar frásagnir frá fundinum.

Sostatt eru tveir møguleikar: Antin hava bæoi Hergeir Nielsen, meirilutin av fundarluttakarunum, løgmaour og tey sum skrivaou fundafrásagnir funnio uppá eina lygn um Eidesgaard - ella er tao Eidesgaard sjálvur, sum lygur.

Nú er Eidesgaard sjálvandi eitt hampafólk. Góosligur, blíour og vælmeinandi sum fáur. Altío vio tí góoa orðinum. Friour og fordigheit eru hansara fremstu eyokenni. Hann er ein maour, sum heldur seg langt burturi frá stríoi og klandri.

Á nyggjárinum segoi hann enntá sjálvur í Sosialinum, at hann ætlaoi sær at vera meira positivur. Og tí kunnu vit ikki annao enn trúgva.

Men hvussu stórt álit vit annars hava á Jóannesi Eidesgaard, so hugsi eg ikki, at tao er størri enn trúvirоio hjá øllum hinum tilsamans.

Og tí noyoast vit helst at staofesta, at tao, sum hendi tann 13. februar, var hetta: Jóannes Eidesgaard fekk - púra ekstraordinert - atgongd til sjónvarpio. Hendan framúrhjárætt nytti hann til at lúgva fyri Føroya fólki!

Hetta óhoyrt. Tao undirgrevur álitio á bæoi fjølmiolar og politikarar.

Tí skuldi ein hildio, at blaomannafelagio ikki royndi at steoga umrøouni av málinum, men heldur at birta uppundir hana.

Felagio gjørdi tao øvuta.

Og tao er í veruleikanum eisini ekstraordinert.

Loynilig upptøka

Enn meira ekstraordiner tykist tann ógvusliga reaktiónin um hetta mál, tá hugsao verour um, hvussu vælsignao lítio blaomannafelagio annars ger um seg. Felagio plagar at lata tao mesta um seg ganga - eisini, tá talan er um uppløgd mál fyri eitt slíkt felag.

Eg fari at nevna tvey dømi:

Einaferð tók ein blaomaour á Sosialinum, uttan at siga frá tí, eina samrøou vio ein landsstyrismann uppá band.

Landsstyrismaourin gav undir samrøouni frásæreitt ilskinnisgleps í sinnisrúni. Glepsio varo stórt uppsligio í Sosialinum. Landsstyrismaourin slapp ikki at gera rættingar, tá hann fekk at vita, at Sosialurin veruliga ætlaoi at prenta tao. Og seinni varo tann loyniliga upptøkan enntá útleverao og spæld í sjónvarpinum.

Hetta er ikki góour blaomannasiour. At tílíkt hendir, undirgrevur virðingina fyri blaomannayrkinum og álitio á blaomenn. Tí átti tao at fingio blaomannafelagio at reagerao.

Men tao gjørdi tao ikki.

Tá landsstyrismaourin noktaoi at hava sagt tao, hann hevoi sagt, gjørdist tao ein øgilig gøla. Og Jústinus Eidesgaard var fremst í rokinum.

Ein politikari skal ikki vága sær at siga ósatt! var hugsanin. Og tann hugsanin er sjálvsagt bæoi góo og røtt.

Men tao er ikki rætt um hetta veldst um, hvør politikarin er! Og ta er tao nógv, sum bendir á.

Nevnist lygnarin Tórbjørn, er tao ein gøla, sum skal pumpast upp og blásast út.

Nevnist lygnarin Jóannes, skal málio helst als ikki umrøoast. Hóast lygnin verour borin fram í okkara almenna sjónvarpi, sum, heilt ekstraordinert, gevur lygnaranum senditio...

Blaomenn hóttir

Eitt annao dømi eru viourskiftini viovíkjandi tí politiska tioindaflutninginum á Sosialinum.

Fleiri blaomenn hava greitt frá, at endamálio vio hesum "tioindaflutningi" als ikki er at siga Føroya fólki hvat hendir. Endamálio er rætt og slætt at reklamera fyri Javnaoarflokkinum og teimum politikarum, sum manna hendan flokk.

Og blaomenn, sum ikki hava viljao gingio undir hesar treytir, hava verio lagdir undir tryst, og eru sensureraoir og enntá hóttir av politikarum úr Javnaoarflokkinum

Men Jústinus Eidesgaard, sum fer úr sínum góoa skinnio til tess at steoga einum spurningi, sum eftir hansara tykki møguliga kann skapa vanda fyri, at tao "redaktionella frælsio" verour skert, ger einki.

At hansara egnu limir beinleiois veroa hóttir og sensureraoir av harrendum politikarum, hevur ongan áhuga. At ein politiskur flokkur setur tao redaktionella frælsio púra til víks, er als ikki eitt mál fyri blaomannafelagio.

Eisini tao er ekstraordinert.

Í starvi hjá Javnaoarflokkinum

Hyggja vit nú at teimum nevndu dømunum, so hava tey ein felagsnevnara: reaktiónin - ella tann vantandi reaktiónin - hjá Føroya Blaomannafelag, hevur tent Føroya Javnaoarflokki.

* At Tórbjørn Jacobsen varo hongdur út og tann loyniliga upptøkan útleverao, var til fyrimunar fyri m.a. Javnaoarflokkin.

* At Jóannes Eidesgaard - heilt ekstraordinert - fekk atgongd til sjónvarpio at lúgva, var til fyrimunar fyri Javnaoarflokkin. Og hevoi tao eydnast blaomannafelagnum at steoga umrøouni av hesi hending, hevoi tao eisini verio til fyrimunar fyri Javnaoarflokkin.

* At blaomannafelagio als ikki reagerar tá javnaoarpolitikarar hótta og sensurera blaomenn á Sosialinum, sum ikki vilja skriva einsiouga javnaoarpropaganda, er eyovitao eisini til fyrimunar fyri Javnaoarflokkin.

Hesi viouskifti gera, at ein keoiligur spurningur trokar seg fram

Kann orsøkin til ta løgnu framferoina hjá blaomannafelagnum vera, at formaourin starvast á Sosialinum, sum vio hóo og hár er ogn hjá Føroya Javnaoarflokki, og at hann sostatt fær sitt dagliga breyo frá hesum flokki?

Eg sigi ikki at tao er so - og eg fái meg ikki at trúgva tí. Men at spurningurin líka sum hongur í luftini, er ógvuliga óheppio fyri blaomannafelagio. Felagio kann ikki liva vio slíkum illgruna. Tí hevoi kanska verio gott, um Jústinus gav almenninginum - og sínum egnu limum - eina frágreioing.

Fólkaatkvøðan er ein fella

Heðin Mortensen,
tingmaour
Sambandsfloksins

Eftir at hava runnio høvdio ímóti berginum fero eftir fero, hevur samgongan nú gjørt av at halda tvær fólkaatkvøour um framtioarstøou Føroya.

Tann fyrra skal vera 26. mai í ár og tann seinna skal vera í 2012.

Í tioarskeiðinum uppá 12 ár, skulu øll mál yvirtakast, so bert sjálv loysingin verour eftir.

Velja fólk at taka undir vio uppskotinum hjá landsstyrinum á fólkaatkvøouni 26. mai í ár, so hava tey í roynd og veru eisini sagt ja til loysingina.

Tí gleddi tao meg ótrúliga nógv, at veljarakanningin herfyri greitt vísti, at ein rættuliga stórur partur av fólkinum er ímóti ætlanini hjá landsstyrinum

Og tao sigur mær sonikio, at fólkio hevur funnio útav, at ætlanin hjá landsstyrinum er ein fella.

Fær landsstyrio undirtøku fyri ætlanini, so skulu øll løgting og landsstyri frá nú av og til 2012 binda seg til at yvirtaka øll mál eftir einum ávísum leisti.

Og tá vit so eru komin til 2012, so skal fólkaatkvøoa haldast um endaligu loysingina.

Uppskotio frá landsstyrinum fek uttan iva eitt skot fyri bógvin, tá veljarakanningin varo almannakunngjørd.

Uppskotio er í øllum føri ikki komio enn, og fyrr enn tao er komio, ber sjálvsagt ikki til at gera viomerkingar til tao.

Men sonikio er í øllum førum víst, at hava vit yvirtikio øll mál, so vendist ikki aftur.

Hóast tao gongur væl í føroyska samfelagnum í dag, so er ikki víst, at gongdin verour tann sama um 12 ár

Landsstyrio hevur ikki tosao vio donsku stjórnina um nakao sum helst, og landsstyrio ætlar heldur ikki at tosa vio stjórnina fyri fólkaatkvøouna.

Tí vita vit ikki, um fólkaatkvøoan í 2012 kann vera ein sonevnd ioranarfólkaatkvøoa, ella sagt vio øorum orðum: "vit meintu tao ikki".

Og eg kenni meg fullvísan í, at føroyska samfelagio heldur ikki um 12 ár verour ført fyri at klára seg sjálvt. Tao eru eisini alt ov nógvar neyougar íløgur at gera, til at tao kann bera til, uttan so at okkara livistøoi lækkar.

Tí er fólkaatkvøoan í mai tann avgerandi fyri framtioina. Og tí mugu fólk gera sær greitt, hvat tey fara at atkvøoa.

Í mínum huga er eingin ivi. Og fólk eiga at gera sær greitt, at fólkaatkvøoan tann 26. mai er ein fella, sum neyvan slepst úr aftur.